LM-045/2023

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Fylgiskjal 7

Løgmálaráðið,
Gudrun Mortansdóttir Nolsøe, serfrøðingur

25. september 2023
Mál: 23/17155-2
Viðgjørt: Anna Katrin Matras

Hoyringssvar vegna Sig frá! um uppskot til broyting í revsilógini (Kynslig avnoyðsla og lokking)

Løgmálaráðið hevur sent Almanna- og mentamálaráðnum til ummælis uppskot til broyting í revsilógini (kynslig avnoyðsla og lokking)

Almanna- og mentamálaráðið/Sig frá! hevur varðað av fyrru heildarætlanunum um harðskap og kynsligan ágang (2012-2023) og nú nýggju heildarverkætlanini um harðskap í parlagi og nærsambondum 2023-2028. Partur av hesum arbeiði er, við upplýsing og kunning, at breiða út boðskapin, at harðskapur er ikki í lagi, og at vit sum samfelag ikki kunnu liva við, at harðskapur er partur av lívinum hjá nøkrum borgarum í landinum. Endamálið er eisini ein avtabuisering, fyri at eggja til at bróta tøgnina og tosa um harðskapin, og at eggja fólki til at siga frá – bæði tey, sum eru fyri harðskapi, og tey, sum vita ella eru stúrin um, at harðskapur fer fram.

Skipað verður javnan fyri átøkum, ið varpa ljós á at minnast til samtykki, m.a. fyri at fáa bæði børn, ung og eldri at verða tilvitað um at seta egin mørk og um at virða mørkini hjá øðrum. Almanna- og mentamálaráðið fegnast tí um ætlaðu broytingarnar í revsilógini, ið er í tráð við tað arbeiðið, ið Sig frá! saman við øðrum hevur staðið fyri hesi seinastu árini.

Í tilfarinum, sum er sent okkum til ummælis, kap. 2.1, sæst, at mett verður *ikki*, at tað vegna lógaruppskotið verður talan um fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Talan er um at dagføra kapittul 24 í revsilógini, har talan er um nýggja áseting, sett inn sum § 229 í kapittul 24, um kynslig brotsverk. Ásetingin viðvíkur lokking (grooming), samstundis sum § 225 verður víðkað til at fevna um kynsliga avnoyðslu (sextortion). Somuleiðis verður § 228 víðkað til eisini at fevna um lokking.

Hóast upplýsing og kunning ikki verður nevnt her, fara vit at minna á, at hetta arbeiðið eisini eigur at rúma at upplýsa og kunna um tær broytingar, sum lógaruppskotið leggur upp til. Sig frá! fer eisini frameftir at skipa fyri upplýsandi tiltøkum og at fáa til vega undirvísingartilfar fyri yrkisbólkar, felagsskapir og myndugleika, sum virka í einum markamóti, har harðskapmál – her undir kynslig brotsverk – verða handfarin.

Vinaliga

Anna Katrin Matras
fulltrúi

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo